# Fimmti ára føðingardagur við bókaútgávu



*Nevndin í P/F Auto: Atli Simonsen, nevndarformaður, Lina av Reyni, stjóri, og Johan Simonsen nevndarlimur*



*Bókin, AUTO - altíð til tænastu, bleiv løgd fram fyrstu ferð á føðingardegnum hjá Auto. Á myndin eru f.v.: Johan Simonsen, Lina av Reyni, Atli Simonsen, Eigil Gunnarsson og Magnus Gunnarsson*

**Týsdagin var móttøka á Parnassinum á Hotel Hafnia í sambandi við, at bilstøðin Auto í Havn bleiv 50 ár. Bókin, AUTO - altíð til tænastu, varð løgd fram hendan dagin**

FØÐINGARDAGUR
*Eirikur Lindenskov*

Nógv fólk møttu til móttøkuna á Hotel Hafnia týsdagin, tá bilstøðin Auto hátíðarhelt 50 ára føðingardagin. Umframt familjur hjá teimum, sum hava koyrt á støðini og onnur vitjandi, vóru nakrir av stovnarunum, bilførarar og støðgentur, sum hava koyrt og arbeitt á støðini øll hesi mongu árini.

Á móttøkuni varð bókin, AUTO - altíð til tænastu, fyrstu ferð løgd fram.

Bókin er eitt 50 ára minnisrit um bilstøðina Auto og um hýruvognskoyring í Havn og út frá Havnini. Í bókini er eisini nógv siðsøguligt tilfar. Fleiri enn 450 myndir og gamlar lýsingar eru í bókini, harav umleið helvtin eru myndir av bilførarum og støðgentum.

Magnus Gunnarsson skrivaði bókina fyri P/F Auto.






# Sparikassin bakbundin

**Um ynskið er at menna Elektron ella føroyskt telduvirksemið, so gerst tað ikki við at leggja hesar fyritøkur í kuvøsu. Tað sigur Sparikassin í viðmerking til nógv umrøddu Gjaldskipanina. Sparikassin kennir seg politiskt bakbundnan í málinum**

PENGAFLYTINGAR
*Ingi Rasmussen*



Fyri føroyskar peningastovnar er tað ein fullkomiliga órímilig støða at vera í, um teir ikki sjálvir kunnu gera av, hvørjar skipanir teir vilja menna og nýta.

Soleiðis sigur Sparikassin, sum við einum brævi hevur givið Fíggjarnevndini og harvið løgtinginum sína greiðu støðu til kennar í málinum um nýggju Gjaldskipanina, GS, hjá Elektron og peningastovnunum.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, hevur boðað frá, at hann ætlar at herða kunngerðina um vernd av persónsupplýsingum, so Gjaldskipanin, sum longu nú virkar, verður steðgað.

Sparikassin førir fram, at um Høgni Hoydal ger álvara av sínari ætlan, so verður forðað fyri, at peningastovnarnir hava ein effektivan og kappingarføran rakstur.

## Aðrar tíðir

Gjaldskipanin byggir á samstarv við danska PBS, sum føroysku peningastovnarnir eiga í.

Stríðið hevur verið prinsipielt. Spurningurin er, um tað skal vera loyvt Elektron og harvið peningastovnum at flyta persónsupplýsingar av landinum. Tað krevur Gjaldskipanin, sum skal avgreiða sjálvvirkandi flytingar fyri fólk.

Atlitini í málinum um Elektron eru eisini onnur. Tað hevur verið róð framundir, at óttin fyri Gjaldskipanini heldur snýr seg um at verja Elektron í eini roynd at fyribyrgja, at bankarnir flyta sítt edvsamstarv av landinum.

Hesin hugburður var kanska skiljandi í kreppuárunum, sigur Sparikassin, tí tá var føroyska samfelagið í svárari kreppu, men nú er tíð at hyggja fram-eftir.

Um forðað verður fyri samstarvi við fyritøkur uttan fyri Føroyar, so hongir tú ein mylnustein um hálsin á føroyskum fyritøkum og stovnum – og harvið eisini føroyska samfelagnum. Málið um gjaldskipanina er eitt talandi dømi um hetta, fortelur Sparikassin okkara løgtingsmonnum.

## Ongin kuvøsa

Roynt verður eisini at sissa løgtingsmenn, sum stúra fyri framtíðini hjá Elektron. Peningastovnarnir brúka Elektron á tamb og hava ongar ætlanir at gevast við tí, verður sagt, men tørvurin er so mikið stórur, at Gjaldskipanin hjá PBS má takast í nýtslu fyri at geva Elektron betri møguleikar at loysa aðrar átrokandi uppgávur.

Um ynskið er at menna Elektron ella føroyskt telduvirksemi, so gerst tað ikki við at leggja hesar fyritøku í kuvøsu. Allar royndir vísa, at tað bert førir til framleiðslu, ið ikki er kappingarfør. Menning fæst fyrst og fremst við at luttaka í kapping, sigur Sparikassin í sínari verjurøðu fyri Gjaldskipanini.

## Frítt at fara

Hvussu er og ikki. Málið snýr seg um persónligar upplýsingar um fólk, og tað er eitt kensluborið evni.

Sparikassin ger vart við, at í hesum føri er ikki talan um at flyta, eymar kensluligar upplýsingar av landinum. Fluttar verða ikki navnaupplýsingar ella aðrar viðkvæmar upplýsingar um persónar, bara nakrar kotur, sum ongin kann brúka í sær sjálvum.

Sparikassin vísir á, at hann hevur stuðlað tí gongd, sum hevur verið at avtaka allar avlagandi reglur. Tí heldur Sparikassin, at peningastovnarnir afturfyri skulu fáa frítt spæl uttan politiska uppíblanding.

– Vit høvdu ikki væntað, at tá verjugarðurin úteftir varð tikin niður, skulu føroysku peningastovnar taka dystin upp við bakbundnum hondum. Í dag mugu vit staðfesta, at vit hava verri treytir í okkara egna landi, enn útlendsku kappingarneytar okkara, sum frítt kunnu virka í Føroyum, sigur Sparikassin í sínari viðmerking til málið um Gjaldskipan.

Ískoytið til kjakið var latið politikarum, tá Sparikassin gjørdi sínar viðmerkingar fyri fíggjarlógina fyri 2003.

# Snjóhvíta fylgir við tíðini og fæst nú á fløgu

**Ævintýrini um Snjóhvítu og Edlførið eru nú fløgutøk. Talan er um endurútgávu av kendu LP-plátuni, sum Herman Jacobsen so hegnisliga legði til rættis á sinni**

FLØGUR
*Dagfinn Olsen*

Tutl er í gongd við eina ætlan um endurútgávur á fløgu. Hetta eru plátur, sum skulu gerast fløgutøkar.

Ævintýrplátan við Snjóhvítu og Eldførinum, sum hvørt mansbarn kendi fyri eini 20-25 árum síðani, er nú komin á fløgu. Tað var Herman Jacobsen, sáli, sum legði til rættis hesa væl eydnaðu plátuútgávu.

Tutl hevur nú, í samstarvi við son Herman, Rúna, givið ævintýrini út á fløgu. Nú verður sostatt høvi at njóta frálíka ljóðmyndirnar fram aftur, hóast plátuspælarin er horvin av stovuhillunum. Við nýggju fløguni slepp-ur eitt nýtt ættarlið av føroyingum at eiga lut í meistarligu dramatiseringunum, har nøkur av Føroya bestu sjónleikarum tóku lut. Eins og leikstjórin og tilrættisleggjarin, so eru fleiri teirra ikki millum okkum longur.

## Væl mannað

Herman Jacobsen var maður við margfaldum listargávum og afturat sær á ævintýrútgávuni savnaði hann góða manning.

Við í Snjóhvítu leika Elin Mouritsen, Kristina Øster, Óli K. Hansen, Oliver Næs, Bjørgfinnur Nielsen, Hermann Jacobsen, Kristian Samuelsen, Jan Bendtsen og Pauli Jacobsen. Marius Rein var tøkningur,

Við í Eldførinum leiktu Kristina Øster, Oliver Næs, Elin Mouritsen, Rósa á Rógvu Joensen, Oskar Hermanson, Óli K. Hansen, Rólant Samuelsen, Hermann Jacobsen. Fyri tónleikinum stóð Sven Brimheim og John Isholm var tøkningur. Bárður Jákupsson teknaði húsan.

Fløgan við Snjóhvítu og Eldførinum fæst kring alt landið.

Teir tóku land 7

Føroyingar í Grønlandi

"Teir tóku land" snýr seg hesaferð um føroyskan útróður og fiskavinnu í Grønlandi í sekstiárunum.

Flakavirkið hjá Nordafar fór nú at taka móti fiski úr Grátufjørðinum, Tovkussak og báðum havnunum í Ravnsoynni.

Allir útróðrarmenninir løgdu um frá saltfiski til feskfisk. Samvinnufelagið gavst at samskipa útróður í Grønlandi.

Saltfiskarmenninir í Kangarsuk og Borgshavn stovnaðu egið felag. Grønlandsfelagið bygdi eina nýggja røð av dekshátum til útróður í Føroyingahavnini.

Gerandisdagurin hjá útróðrarmonnum verður lýstur, og greitt verður frá, tá ein føroysk genta hvarv í Grátufjørðinum.

Frásøgn er um kendasta føroyingin í Grønlandi, sum var skipari á grønlendska hvalabátinum "Sonja".

Fullfíggjað yvirlit er yvir allar útróðrarmenn.






Jógvan Arge